# Nógvar bøkur



*Birgir Kruse*

Ongantíð áður eru so nógvar bøkur komnar á føroyskum sum undanfarna ár. Heilar 169 í tali. Tað kundi Føroya Landsbókasavn staðfesta longu annan dagin í nýggja árinum.

Tað besta føroyska bókaárið hevur higartil verið 1990, tá 161 bøkur vórðu útgivnar á móðirmálinum. Fyrrárið løgdust 121 bøkur afturat tiltakandi føroyska bókavarðanum. Í fjør varð so samlaða talið av føroyskum bókum 169. Millum hesar taldist bók nummar 4000 á føroyskum máli. Tað var bókin hjá Andrasi Mortensen “Hin føroyski róðrarbáturin”, sum kom út hin 29. november.

Við teimum 169 bókunum, sum komu aftrat í fjør, er samlaða talið av føroyskum bókum í eitt 178 ára skeið komið upp á 4.051. Soleingi hava føroyskar bøkur verið til. Tað var í 1822, at hin fyrsta føroyska bókin skrivaði søgu.

*Andras Mortensen rithøvundur við bók nr. 4000 "Hin føroyski róðrarbáturin". Hin 9. februar skal hann verja doktararitgerð á Sjómanskúlanum í Havn*

Skifta vit tær 169 bøkurnar, sum komu í fjør, í ymsar bólkar, kunnu vit staðfesta, at stórsti bólkurin er yrkisbókmentir. Heilar 76 av teim íalt 169. Men nógv tær flestu føroysku yrkisbøkurnar í fjør vóru upprunaføroyskar. Bert 14 teirra vóru týddar.

Næst stórsti bólkur av bókum eru barna- og ungdómsbøkur. Her eru tær allarflestu týddar. Bert 3 av teim tilsamans 37 vóru upprunaføroyskar. Bókadeild Føroya Lærarafelags er virknasta forlag á hesum øki.

Triðstórsti útgávubólkur er fagurbókmentirnar, sum í fjør taldu 32 titlar. Heili ellivu yrkingasøvn og fýra sjónleikir, eins nógvir og upprunaføroysku skaldsøgurnar. Telja vit tær týddu skaldsøgurnar við, so fáa vit tíggju umframt. So marghláttligt tað ljóðar, so kann verða, at týðingararbeiði er tað, sum lønar seg best, tá um skaldsøgur ræður. Tað forlagið, sum hevur gjørt mest vart við seg í hesum bólki, man vera forlagið Sprotin.

Síðsti bólkurin av bókum eru skúla- og lærubøkurnar, sum vóru 24 í tali. Tær allarflestu upprunaføroyskar, bert tvær týddar. Tað er Skúlabókagrunnurin, sum sambært lóg er mest virkin á hesum øki. Tó eru fleiri útgávur rættguliga almennar, sum til dømis “Havið” og “Flora”.

Í alt komu 169 bøkur í fjør - 103 upprunaverk og 66 týðingar.

Umframt hesar 169 bøkurnar á føroyskum eru eisini útkomnar ein hópur av bókum um føroysk viðurskifti á øðrum málum - serliga á donskum. Árbøkur, ársfrágreiðingar, álit og annað eru heldur ikki taldar við í tær 169 bøkurnar. Heldur ikki tær tíggju føroysku ljóðbøkurnar, sum eru føroyskar bøkur lisnar inn á bond, fyrst og fremst at brúka hjá teimum, sum ikki fáa lisið vanligar bøkur. Hesar ljóðbøkur verða lisnar inn á band á Landsmiðstøðini fyri Undirvísingaramboð.

# Út við bókmentum!

## NORLA og MUNIN



*Birgir Kruse*

Ja, yvirskriftin skal takast bókstaviliga. At koyra bókmentir út, út á altjóða marknaðin. Har fólk og lesarar eru. Í hópatali. Fyrimyndin í hesum føri eru norðmenn, sum í nøkur ár hava marknaðarført bæði fagur- og yrkisbókmentir í útlandinum. Nú verður eisini alnótin nýtt í markleysa tykisheimi.

NORLA er skrivstovan fyri norskar fagurbókmentir í útlandinum. Hetta er ríkisstuðlað og ikki-handilslig kunningarstova. Hiðani fáast allir upplýsingar um norskar fagurbókmentir og rithøvundarnar aftanfyri bøkurnar. Á skrivstovuni arbeiða trý fólk, ein dagligur leiðari, ein ráðgevi og ein skrivari. Teimum til handa gongur bæði eitt stýri og eitt ráð. Tað er norska mentamálastýrið sum fíggjar raksturin. NORLA gevur út “Selected Norwegian Fiction” og eitt tíðindaskriv við ummælum av norskum bókum. Tíðindaskrivið kemur tvær ferðir um árið.

MUNIN er norsk yrkisbókmentunarlig skrivstova við fýra árum á baki. MUNIN er áhugafelagsskapur við tí endamáli, at samskipað og professionaliserað útbreiðsluna av norskum yrkisbókmentum kring heimin. Grundsjónarmiðið er sjálvsagt, at umheimurin ikki kann verða norskar yrkisbøkur fyriuttan. ”I visshet om at norsk faglitteratur har mye å tilføre utlandet, formidler MUNIN informasjon om norsk faglitteratur og gir økonomisk støtte til oversettelser” verður sagt á heimasíðuni hjá skrivstovuni.

Tað var felagið av yrkisbókarithøvundum, Norsk faglitterær forfatter- og oversetterforening, sum tók stig til at stovna MUNIN. Skrivstovan fær eisini stuðul frá norska mentamálastýrinum, Norsk Kulturråd og Norska Bókaútgevarafelagnum. Í stýrinum og týðaranevndini í MUNIN eru fólk við altjóða áhuga og kontaktum. Dagligur leiðari í MUNIN er Elisabet W. Middelthon, sum hevur drúgvar royndir á altjóða bókamarknaðinum.

Kundi hugsast, at útlendska oljuvinnan vil lata ein pott av hvørjari forvunnari tunnu til týðarar, so føroysk bókmentaverk kundu verið flutt í altjóða ljós. Livst so borast.

Meiri er at lesa um báðar norsku bókmentunarligu skrivstovurnar í alnótini á hesum adressum:

www.boknett.no/norla
www.boknett.no/munin




## Endurlýsing eftir LEIÐARA til Dagstovnin í Kvívík

Vegna ov fáar umsóknir søkir Kvívíkar Kommuna av nýggjum eftir leiðara til Dagstovnin í Kvívík til setan 1. apríl 2001 ella eftir nærri avtalu. Starvið er fulltíðarstarv.

Undir Dagstovninum í Kvívík eru vøggustova til 10 børn, barnagarður til 20 børn, skúlaskipan til 10 børn og frá 1. januar 2001 eisini dagrøkt, har tað í løtuni eru 3 børn.

**Leiðarin**
Vit sóknast eftir leiðara, sum:
- hevur útbúgving sum pedagogur
- hevur royndir á økinum
- á námsfrøðiligan hátt kann virka fyri at útinna lógarásettu uppgávuna hjá dagstovninum at menna, menta og hava umsorgan fyri børnunum í tryggum umhvørvi
- hevur hug og vilja at seta sín dám á endamálsorðingina fyri stovnin
- er opin fyri nýhugsan
- í samstarvi við bygdarráð og foreldur kann vera viðvirkandi til at fylla út karmarnar um ansingarskipanina í kommununi
- hevur góð samstarvsevnir

**Kommunan kann bjóða**
Eitt spennandi og avbjóðandi starv. Leiðarin verður við til at skapa karmarnar á ansingarøkinum, sum hevur stóran týdning fyri kommununa. Løn sambært sáttmála millum Føroya Landsstýri og Føroya Pedagogfelag.

Møguleiki er fyri, at starvsøkið kann verða víðkað /broytt innan fyri ásettu karmarnar í lógini.

Umsóknir saman við avriti av prógvum, CV o.ø. skulu sendast til:

**Kvívíkar Kommunu**
FO-340 Kvívík

og vera kommunuskrivstovuni í hendi seinast mánadagin 15. februar 2001.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til bygdarráðsformannin, Heina Holm, tlf. 421294 ella 210294.








## Avloysari fyri skrivstovufólk í Løgtinginum

Eitt avloysarastarv fyri skrivstovufólk í farloyvi er leyst at søkja. Tíðarskeiðið er frá 1. mars 2001 til 1. mars 2002.
Uppgávurnar eru í høvuðsheitum hesar: Telefonavgreiðsla, ávísingar, ferðaforskot og ferðauppgerðir, fráðboðan til og skráseting av nevndarfundum og onnur skráseting í sambandi við løgtingsarbeiðið, harumframt annað vanligt skrivstovuarbeiði.
Tann, ið settur verður, skal helst hava skrivstovuútbúgving ella samsvarandi útbúgving ella royndir á økinum. Ein treyt fyri at verða settur er, at viðkomandi er kønur í føroyskum og hevur royndir at arbeiða við teldu. Umsøkjarar, sum hava kunnleika til Access hava fyrimun.

Starvið verður lønt eftir sáttmálanum millum Fíggjarmálstýrið og Starvsmannafelagið.

Umsóknir saman við prógvum og møguligum ummælum skulu vera Løgtinginum, Erling Jallsgøta 6, Boks 208, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 22. januar 2001 kl. 16.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Thurid Debess, skrivstovuleiðara, tel. 3110 00.”

L. v.

Súsanna Danielsen
stjóri



## ÚTBJÓÐING

Vegna Almanna- og heilsumálastýrið verður arbeiðið viðv. útbygging av Landssjúkrahúsinum, 3. byggistig við hesum boðið út í almenna lisitasjón.

Arbeiðið umfatar inniloking og komplettering av einum bygningi í 4 hæddum umframt kjallara og tilhoyrandi teknikkhædd, tilsamans o.u. 5200 $m^2$. Boðið verður út í niðanfyri nevndu arbeiðistøkum:

A) Inniloking
B) Timbur- og snikkaraarbeiði
C) Gólválegging
D) Málaraarbeiði
E) VVS-arbeiði
F) El-arbeiði

Lisitasjónin verður ultimo februar 2001. Tíð og stað verður kunngjørt nærri í útbjóðingarskrivi, ið verður sent teimum bjóðandi.

Útbjóðingartilfarið kann bíleggjast í seinasta lagi 9. januar 2001 við at flyta kr. 20.000,00 í veðhaldi fyri hvørja arbeiðistøku á konto nr. 1269218 í Føroya Sparikassa. Tilskilast skal á inngjaldingarfráboðanina, hvørjar arbeiðistøkur, talan er um. Veðhaldið verður afturgoldið, um útbjóðingartilfarið er aftursent í seinasta lagi eina viku aftan á lisitasjónina.

**Sp/f Arkitektavirkið Árni Winther**
Niels Winthersgøta 4
100 Tórshavn
Tel. 31 41 90

**Landsbyggifelagið P/F**
Grønlandsvegur 5
100 Tórshavn
Tel. 31 47 44



## Bátur til sølu

15,3 tons, fiskiloyvi 4A, alla nautiska útgerð, 5 automatiskar snellur og línureiðskap.

**Tlf. 424413**



## Handilsinnbúgv til sølu

Kølara, frystara, kassadiskur, hillar, ljósarmatur. o.a.

**Tlf. 214005**



